## Rókur á vøllinum

Tað bendir alsamt meira á, at Fremad Amager verður millum tey næstbestu í Danmark, tá fótbólturin byrjar aftur eftir summarfrítíðina. Um vikuskiftið vann felagið hjá Toda Jónssyni við trimum málum móti einum á útivølli mót B93. Rókur av Fløtum Jespersen spældi sín fyrsta skrásetta dyst fyri felagið, tá hann kom á vøllin frá byrjan í seinna hálvleiki. Føroyingurin hugdi tískil einans at frá beinkinum, tá Thomas Myssing legði gestirnar á odda eftir einans fimm minuttum. Fleiri mál komu ikki í fyrra umfarinum. Thomas Myssing og Daniel Udsen staðfestu sigurin á 3-1 við málum í seinna hálvleiki.



## Tem kom á vøllin

Christian Lamhauge Holst var ikki við hjá Lyngby, sum um vikuskiftið vann sær eitt stig í botnstríðnum í superliguni. Lyngby hevði vitjan av FC Nordsjælland, og einki mál kom í dystinum á Lyngby Stadion. Føroyski landsliðsspælarin Tem Hansen var á beinkinum hjá Lyngby, og hann varð settur inn í seinna hálvleiki.

B36-ÍF 4-0 (1-0):

# Ungarar stjólu myndina

B36

ÍF

**Nýggju ungararnir í B36, Tamás Nagy og Karoly Potemkin, stjólu myndina í Gundadali leygardagin, tá ársstalsfelagið vann trivaligan sigur á uppflytarunum úr ÍF**



**FORMULADEILDIN**
*Uni Holm Johannesen*

Tað kemst ikki uttan um, at tað nógvu seinastu árini ongantíð hevur valdað so stór óvissa um fyritreytirnar hjá B36, sum í ár. Lyklaleikararar Jákup Mikkelsen, Fróði Benjaminsen, Jóhan V. Gunnarsson, Mikkjal Thomassen og Amed Davy Sylla eru ikki at finna í felagnum longur, og nú hvílir ábyrgdin á yngru leikararum. Við úrslitinum leygardagin staðfesti árstalsfelagið í øllum førum sína styrki, tá hvítu havnarmenninir vunnu trivaligan sigur á uppflytarunum úr ÍF, sum vitjaðu í Gundadali. Sjálvsagt skal eisini verða sagt, at B36 hevði stóran fyrimun við, at Aleksander Jovevic miðskeiðis í fyrra umfarinum var útvístur.

Tað vóru serliga nýggju ungararnir í B36, Tamás Nagy og Karoly Potemkin, ið gjørdu vart við seg. Teir stóðu fyri trimum av teimum fýra málunum hjá árstalsfelagnum, og hava alt fyri eitt staðfest sítt navn millum fjeppararnar.

### Jovevic útvístur

ÍF hevði veruliga ryggin móti múrurin, tá miðvallarkempan Aleksander Jovevic um miðjan fyrra hálvleik var útvístur. Hann steðgaði fyrst Róaldi Jacobsen, sum hevði kósina móti málinum, og tveir minuttir seinni var Hanus Thorleifsson harðliga sendur niður í grasið. Tvey gul kort geva reytt, og Jovevic noyddist longu undir brúsuna.

Fuglfirðingar vóru veruliga í mótbrekku hesa løtuna, og tað tókst lítil ivi vera um, hvar sigurin skuldi. Løtu framman undan hevði Tamás Nagy, sum leikti sín fyrsta skrásetta dyst fyri B36, lagt heimaliðið á odda. Eftir hornaspark stýrdi Klæmint Matras bóltin fyri føturnar á ungaranum, sum fyrstu ferð sendi í netið. Tamás Nagy leikti allan dystin sum framrættaður miðvallari, og hann stóð seg væl.

Fuglfirðingar, við einum manni minni, fullu als ikki í fátt og stríddust væl. Tað sást eisini aftur á dómarabókini hjá Peturi Reinert, sum heili sjey ferðir sektaði gestirnar við gulum kortum. Størsta møguleikan áttu teir, tá Áki Petersen fekk væl av plássi í brotsteiginum, men hann skallaði beint á Meinhardt Joensen.

Í verjupartinum riggaði væl hjá ÍF, men eftir at Aleksander Jovevic var útvístur, var neyðugt við broytingum í uppstillingini. Hetta hevði við sær, at Sasa Jovanovic var sera einsamallur sum framherji. Hann fekk ikki víst tað stóra, og var loystur av Atla Petersen, tá ein tími var leiktur av dystinum.

### Hol á málskjótingina

Tað skuldi ganga long tíð, áðrenn B36 økti og avgjørdi dystin. Ungu Róaldur Jacobsen og Odmar Færø leiktu seg væl ígjøgnum, áðrenn hesin seinni nevndi, staddur uttan fyri brotsteigarmarkið, við frálíkum skoti sendi niður í handara horn. Eitt frálíkt mál av Færø, sum somuleiðis var hansara fyrsta fyri árstalsfelagið. Hann leikti á nýggjum plássi – høgri bakkur – og hann slapp væl frá uppgávuni. Tá restaðu 20 minuttir.

Ungi Johan Ellingsgaard fekk, júst sum í steypadystinum móti Skála, aftur møguleikan sum einsamallur framherji í byrjunaruppstillingini hjá Heðini Askham. Við Bartali Eliasen og Jonn Thomsen í rygginum allatíð hevði hann tað truplult, og ein møguleiki er heldur at flyta unglingin á vongin – men har røkja landsliðsaktuellu Bergur Midjord og Hanus Thorleifsson longu plássini. Ikki tí, Ellingsgaard hevði tríggjar stórar málmøguleikar, men tað eydnaðist ikki at senda í netið. Í fyrra umfarinum rakti hann á tvørtræið, og eftir hvíldina fann hann ikki vegin til málið, hóast hann í tveimum førum var einsamallur móti málverjanum. Hann var eisini útskiftur við Karoly Potemkin, sum fekk seinasta hálva tíma á vøllinum. Og tað skuldi vísa seg at vera ein góð loysn.

Seinastu tíggju minuttirnar tryggjaði ungarski framherjin við tveimum málum, at B36 vann stórsigur. Fyrst stýrdi hann bóltin við høvdinum fram við Andras Gango, áðrenn hann við frálíkum skoti, umvegis stólpan, staðfesti sigurin á 4-0.

Grundarlagið var sera gott fyri tryggum sigri hjá heimaliðnum, tá Aleksander Jovevic var útvístur. ÍF megnaði tó at spæla við í stórum løtum, men tá avtornaði var eingin ivi. Í løtum sást ikki, at gestirnir vóru undirmannaðir.

B36 stóð fyrstu royndina, meðan ÍF legði rygg til ein væntandi ósigur.

## ÍF lærdi nógv

Abraham Løkin, sum leygardagin stóð á odda fyri fuglfirðingum, staðfestir, at ÍF lærdi nógv av dystinum móti B36.

- Vit gjørdust kanska bilsnir av leikferðini, sum er í Formuladeildini. Vit kunnu ikki gera somu mistøk, sum tá tú spælur í næstbestu deildini. Tað lærdu vit, og tað royna vit fyrst og fremst at hugsa um, sigur Abraham Løkin.

Hvussu sást tú reyða kortið hjá Aleksander Jovevic? - var avgerðin hjá Peturi Reinert røtt?

- Ja, eg sá einki galið. Jovevic steðgar fyrst einum mótstøðumanni, áðrenn hann sendir Hanus Thorleifsson í grasið. Tað var til tvey gult kort, so eg skal ikki mótmæla. Vit fáa eisini heili sjey gul kort, og tað sær út av sera nógvum. Men eg merkti ongan ørskap á leikararunum.

## Potemkin er ikki nøgdur

Hóast, at innskifti Karoly Potemkin var tvær ferðir á blettinum í 4-0 sigrinum á ÍF, so var framherjin ikki nøgdur við sítt avrik.

- Eg skuldi havt fingið fleiri mál. Eg kom á vøllin, tá fuglfirðingarnir vóru troyttir og spældu við einum leikara minni. Møguleikarnir vóru til at skjóta hattrick, men tað eydnaðist ikki. So eg eri ikki nøgdur, nei.

Ert tú vónbrotin av, at tú byrjaði dystin á beinkinum?

- Nei, ikki reiðuliga. Eg havi havt trupulleikar av ymsum slag, millum annað viðurskiftini kring uppihaldsloyvinum og skaðar. Tað hevur ikki gingið serliga væl í venjingardystunum, men eg haldi, at vit eru komnir fyri okkum, sigur Karoly Potemkin, sum staðfestir, at hann framvegis ikki er komin heilt fyri seg eftir skaðan.